

# West Hercules undir síðstu uppgávuna áðrenn kós verður sett móti Føroyum

**Jan Müller**

15.02.2014 - 17:33

Oljan.fo

**Norski boripallurin West Hercules, sum fer at bora tveir leitibrunnar á føroyska landgrunninum í ár, fer nú undir sína seinastu uppgávu í Barentshavinum, áðrenn kósin verður sett móti Føroyaleiðunum.**

**Norsku oljumyndugleikarnir hava júst givið Statoil grønt ljós at fara undir seinastu boringina í Barenshavinum í hesum umfarinum. West Hercules skal bora á leitimiðinum "Drivis", sum liggur tætt við risastóra oljufundið Johan Castberg.**

**Drivis** liggur á 345 metra dýpi í Skrugard-loyvinum PL 532. Pallurin skal bora í 40 dagar niður á 2.190 mera dýpi.

Leitað verður fyrst og fremst eftir olju av somu góðsku sum oljan í Skrugard feltinum. Úrslitið av hesum brunninum hevur stóran týdning fyri víðari útbygging av Johan Castberg-feltinum.

Statoil er fyristøðufelag við 50%, Eni hevur 30% og Petoro 20%.

Tá hann er liðugur at bora í Barentshavinum verður gjørt klárt til longu ferðina til Føroya. Statoil hevur fyrr upplýst, at ætlanin er at seta á at bora Brugdan 2 brunnin einaferð í apríl. Tá tann boringin er liðug einaferð í summar  fer West Hercules at bora seinna brunnin í ár, Súlan/Stelkur, sum liggur heilt har eysturi móti markinum